# 98 ár



*Ragnhild, kona Diin, var úr Skálavík. Hon skrivaði søgur til Barnaútvarpið*



*Olavus í Skemmuni, sum var pápi Diin*

annar av sildabátunum.

Teir høvdu sildagørn við, sum teir nýttu at veiða sild til agn. Teir plagdu at fara inn í Íslandi at goyma sildina í einum íshúsi hjá onkrum bónda teir kendu, og høvdu tískil altíð fekst agn. Viðhvørt fingu teir so mikið av sild, at teir saltaðu uppí tunnur, sum teir kundu hava heim við sær til húsarhaldið. Maturin umborð var jú sera eintáttaður við fiski og saltkjøti, so teir nýttu eisini møguleika at keypa seyð frá bóndanum, og fingu teir harvið eisini ein feskan kjøtbita.

## Útróður í Grønlandi

Í 1930 og 1931 var Diurin við Standard. Skipari var Jákup við Á úr Porkeri. Hetta var ein stór skonnart, sum porkeningar áttu saman við manni úr Svendborg. Hon var so stór, at 1200 skippund sóust ikki aftur í henni.

Millum annað róðu teir út í Grønlandi við við einum 5-6 bátum, sum fleiri føroysk skip gjørdu tá í tíðini. Fiskaríið var gott, men prísurin var sera vánaligur, bert 10 oyru pundið. Hetta gav bert einar 300 krónur í avrokning og var hetta sera lítið í mun til veiðuna.

Standard fekk ikki langt lív lagað. Í 1934 sigldu teir á ein boða við Mánaoyggjarnar á Norðurlandinum í Íslandi, og skipið varð vrak. Manningin varð tó bjargað.

## Upplivdi illveðrið, tá Laura og Immanuel fórust

Seinni var Diurin við City of Norwich, har Gunnar Danielsen var skipari. Og í 1932 var hann við Norðfarinum. Her upplivdi hann tiltikna illveðrið, tá ið Laura og Immanuel gingu burtur í 1932, sum greitt hevur verið frá í Miðvikuni í samband við, at 75 ár vóru liðin síðan hesa vanlukku. Teir høvdu verið heima og vóru á veg aftur til Íslands.

Øll skottini stóðu í í lastini, og saltið var í krubbunum í báðum borðum. Saltið var tveitt yvir í annað borðið av sjógnum teir fingu, so skipið fekk slagsíðu. Í lastini var ein tóm krubba, og har stóðu allir spakarnir. Tóma krubban var nú fylt við salti, so fólkið mátti fara í lastina við tallerkum, pottalokum, fjalum og berum hondum fyri at fáa skipið á rættkjøl aftur. Skaðin skipið fekk var so stórur, at teir vendu við og fóru heimaftur.



*Diurin framman fyri tann vakra urtagarðin, sum hann sjálvur røkir. Hann hevur júst nú málað stakittið*

Tað kundi verið áhugavert at frætt, um nakat annar kann vera á lívi av teimm, sum upplivdu hetta veður.

## Gjørdist handilsmaður og reiðari

Í 1937 yvirtók Diurin handilin hjá pápa sínum. Sama ár giftist hann við Ragnhild, dóttir Melchior Nicodemmusen í Skálavík. Ragnhild var ein fróðarkvinna. Í 1979/81 bað Óluva Skaale hana skriva søgur til barnaútvarpið, og tað lá væl fyri. Hon doyði í 2001, og var tá 92 ár.

Tað kann skoytast uppí, at 1937 var eitt syrgiligt ár í Porkeri, tá einar seks ungar konur doyðu av havhestasjúkuni. Fleiri av teimum stóðu undir børu í senn. Ein sum doyði var Kristianna, ættað úr Lorvík, kona Hans Paula undir Stígnum. Hans Pauli var burtur, og jarðarferðin var byrjað. Á kirkjugarðinum sær fylgið eitt skip kom inn eftir Vágsfirði. Tey síggja, at hetta er City, sum Hans Pauli var við. Avrátt verður at steðgað við jarðarferðini, og tá City leggur at, og Hans Pauli gleðir seg til at síggja konuna taka ímóti sær, fær hann í staðin boð um at fara beinleiðis til hennara jarðarferð. Soleiðis var lívið eisini tá.

Diurin minnist, at Sofus Joensen úr Leirvík, sum var ein skyldmaður hjá Kristionnu, talaði i heiminum yvir evnið: »Eg veit at loysnari mín livir.«

Eftir kríggið flyta tey til Vágs at búgva, har tey eisini høvdu handil. Diurin fekst eisini við reiðaravirksemi. Hann keypti sluppina Selnes fyri 25.000 kr. Við nýggjum motori og øðrum umvælingum, kom hon tó at kosta 75.000 kr. Hann rak hana sjálvur á snørisveiðu við Andrev Lindarstein úr Skúvoy sum skipara. Tað gekk heilt væl. Diurin leigaði Selnes út til aðrar reiðarar á sild og útróður.

Í siglingarsøguni hjá Páll Nolsøe greiðir Christian Clementsen á Sandi frá sínum lívi til skips. Hann var fleiri ár við Selnes, og hann sigur, at árini við Selnes vóru góð inntøkuár eftir tátíðarlønum at rokna. Hetta man vera stuttligt hjá Diinum at lesa.

Men hann var eisini ein av undangongumonnunum í ídnaðarfiskveiðu. Í 1971 keypti hann saman við versoninum Viberg og pápa hansara Ansgar Sørensen ídnaðartrolaran Norðland, og gekk hetta væl. Kann siga av royndum, at Diurin var ein góður reiðari.

Í 1970 flutti Ragnhild og Andreas til Havnar, har tey bygdu sær hús úti í Grønlandi. Fyrstu árini arbeiddi hann í Skipshandlinum og seinni á Telefonverkinum, har hann arbeiddi, til hann var 75 ára gamal.

Diurin og Ragnhild fingu døturnar Ina, Oddvør, Brynhild og Jóna. Brynhild býr í Danmark, meðan hinar búgva í Føroyunm. Abbabørnini eru 10, og langabbabørnini eru 25.

## Elsti bilførari í Føroyum?

Sum nevnt hevur Diurin havt koyrikort inntil fyri kortum. Vit hava hoyrt um gamlar bilførarar, men neyvan nakran sum hevur verið í 90-unum, og avgjørt ongan, sum hevur verið so nær teimum 100 árunum, sum Diurin er.

Diurin var tó eingin ársungi, tá ið hann fekk koyrikort. Hetta var í 1966, tá ið hann var 57 ára gamal. Tann bilur, sum Diurin hevur hevur havt seinastu 29 árini, er ein Opel Kadett C, sum var keyptur 7.juni 1978 frá bilasøluni hjá Vilhelm Nielsen. Hann kostaði tá 50.000 krónur. Ein so gamal bilur verður roknaður at vera ellisakfar, og tí eru vegskattur og trygging helvtin av tí vanliga. Men tryggingin man kortini hava havt yvirskot av honum, tí nakar serligur skaði hevur ikki verið.

Tað var hugaligt at fáa hetta stutta prát við Diin. Ein maður, sum hann, hevur upplivað nógv, so vónandi verður høvi til at frætta frá honum seinni.